Trøllanesbørn verða útihýst

Skúlabørnini á Trøllanesi noyðast sjálvi at gjalda fyri tannlæknaferð til Klaksvíkar, og tey fáa ikki boð um tiltøk, sum skúlabørnini í kommuni verða boðin við til

SKÚLASTRÍÐ
Eyðun Klakstein

Mánadagin vóru skúlabørnini í Mikladals kommunu hjá tannlækna í Klaksvík.

Seks av børnunum fóru við lærararnum í Mikladali, meðan sjey børn á Trøllanesi fóru við foreldrum sínum til Klaksvíkar.

Skúlin syrgdi fyri kostnaðinum av ferðini hjá børnunum í Mikladali, meðan foreldrini á Trøllanesi sjálvi noyddust at gjalda fyri sini børn.

Hetta er bert eitt dømi um, at skilnaðurin millum børnini í Mikladali og á Trøllanesi gerst alt týðuligari, eftir at foreldrini tóku børnini úr skúlanum, tí bygdaráðið ikki vil brúka skúlan á Trøllanesi.

Unhugsa at steðga undirvísing

Foreldur á Trøllanesi, sum vit hava tosa við, siga, at tey hava einki samband við skúlan, og tey fáa ikki boð um tiltøk, sum skúlabørnini í kommununi verða boðin við til.

Tey noyddst sjálvi at syrgja fyri síni luttøku í barnafagnaðinum hjá Javna, sum var herfyri, og tey vóru ikki boðin við til konsert fyri skúlabørnum, sum var fyri kortum.

Foreldrini hava undirvíst børnunum heima, men tað hevur verið upp á tal, at hendan undirvísingin skuldi steðgast, so okkurt kundi henda í málinum.

Tað stendur tó púra greitt, at foreldrini vilja hava skúlan á Trøllanesi tiknar í brúk aftur, og tey fara ikki at senda børnini hjá sær í skúlan í Mikladali, um tey ikki eisini kunnu hava skúlagongd á Trøllanesi.

Bygdaráðið í Mikladali svaraði so seint sum í farnu viku, at avgerðin, um at skúlin á Trøllanesi ikki skal takast í brúk, stendur við, og at bygdaráðið ætlar sær ikki at samráðst um hesa avgerð.

Vilhelm Johannesen:

Løgmaður heldur hondina yvir skeivari mannagongd

Vilhelm Johannesen setir nú løgmanni fyrispurning um skúlaviðurskiftini á Trøllanesi. Hann heldur, at løgmaður góðtekur mannagongd, sum er í stríð við lógina

TRØLLANES
Eyðun Klakstein

Vilhelm Johannesen heldur, at løgmaður letur sum einki, hóast niðurleggingin av skúlan á Trøllanesi ikki er í tráð við lógirnar

Vilhelm Johannesen, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, vil nú hava at vita frá løgmanni, hvussu framferðini í málinum um skúlan á Trøllanesi samsvarar við útoyggjaarbeiðið hjá Løgtingsskrivstovuni og lógvarverkið annars.

Tingmaðurin spyr eisini, hvussu tað ber til, at bygdarskúlin á Trøllanesi kann verð lagdur niður, uttan at tað er gingið eftir fólkaskúlalógini.

Fyrispurningurin verð settur á tingfundinum í gjár, og løgmaður skal nú svara Vilhelm Johannesen.

Skulu kenna lógina

Vilhelm Johannesen vil hava at vita, hvussu løgmaður kann geva undantøk frá kommunulógini.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin greiðir tingmaðurin frá eini kæru, sum foreldur á Trøllanesi sendu Kommunala Eftirlitinum. Foreldrini vístu í kæruni á, at bygdaráðsfundurin, sum tók avgerðina um, at skúlin á Trøllanesi ikki skuldi takast í nýtslu aftur, ikki varð lýstur alment, soleiðis sum kommunulógin ásetur.

Svarið frá Løgmansskrivstovuni var, at fundurin var lógligur, hóast hann ikki varð lýstur alment. Umboðini í bygdaráðnum vóru nývald, og tí høvdu tey ikki neyðuga kunnleikan til kommunulógina.

Hetta heldur Vilhelm Johannesen verða løgin pástandur, og hann spyr løgmann, um hann kann geva slík undantøk frá lógini.

– Ongin lógbrótari verður fríkendur í rættinum, tí hann ikki var vitandi um, hvat stóð í lógini. Tað vil siga, at allir landsins borgarar hava skyldu at kunna seg um landsins lógir, eisini tey, sum eru nývaldir kommunustýrislimir, heldur Vilhelm Johannesen.

Í stríð við lógina

Seinni parturin av fyrispurninginum snýr seg um niðurleggingina av skúlanum á Trøllanesi.

Vilhelm Johannesen heldur ikki, at mannagongdin, sum er ásett í kommunulógini, er fylgd. Skúlin á Trøllanesi er ongantíð formliga niðurlagdur, hóast eingin skúlagongd hevur verið har í 14 ár.

– Løgfrøðingar í Mentamálastýrinum eru komnir til ta niðurstøðu, at passivitetur – at eingin skúlagongd hevur verið í skúlanum í nógv ár – hevur niðurlagt skúlan. Men hvar í kommunulógini stendur tað, at passivitetur kann niðurleggja ein skúla, spyr Vilhelm Johannesen.

Hann heldur, at bygdaráðsfundurin, sum strikaði avgerðina um at taka skúlagongdina uppaftur á Trøllanesi, var í stríð við kommunustýrislógina, og sjálv niðurleggingin av skúlanum ikki er farin fram eftir lógini.

– Men løgmaður tykist bert síggja millum fingrarnar við hesum. Ella tað sum verri er, hann tykist halda hondina yvir hesar mannagongdir, sum heilt greitt fremja brot á áðurnevndu lógir, sigur Vilhelm Johannesen.

Leiðari skal setast hálva tíð

Leiðarin, sum skal standa fyri virkseminum í mentanarhúsinum

Atlantis, skal arbeiða hálva tíð

MENTAN
Eyðun Klakstein

Síðst í hesum mánaðinum er freistin fyri at lata umsóknir inn til leiðarastarvið í Atlantis úti. Og beinanvegin aftaná tað ætlar stýrið fyri mentanarhúsið at finna leiðaran millum umsóknirnar.

Leiðarin í Atlantis skal arbeiða hálva tíð, og hann skal taka sær av øllum virkseminum, sum er í húsinum.

Hann skal samskifta við tey, sum Altantis samstarvar við, hann skal saman við einum tøkningi reka biografin, og hann skal taka sær av øðrum tiltøkum, sum verða í húsinum.

Seinni í hesum árinum verður leiðari settur at taka sær av virkseminum í Atlantis. Leiðarin skal arbeiða hálva tíð

Finna pengar

Játtanin frá Klaksvíkar kommunu til Atlantis verður vætnandi hálva millión

– Hetta er bara nóg mikið til at gjalda føstu útreiðslurnar hjá húsinum, og tí má leiðarin eisini skaffa húsinum inntøkur við at hava tiltøk og at leiga hús út til ymiskt, sigur Nikolina Olsen, sum er forkvinna í stýrinum fyri Atlantis.

Nógv hava spurt seg fyri um størvini í Atlantis, men Nikolina Olsen vil einki siga um, hvussu nógv hava søkt størvini sum leiðari og tøkningur enn. Tað vil hon ikki gera, fyrr enn umsóknarfrestin er úti.

Stýrið ræður

Mentanarhúsið Atlanis er nú skipað sum sjálvsognarstovnur, har eitt trímannað stýrið tekur hevur ábyrgdina av húsinum. Tað eru Klaksvíkar kommuna, Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Norðoya Sparikassi, sum hava valt fólkini í stýrið.

Umframt formannin Nikolinu Olsen sita Jógvan Ravnsfjall og Súsanna Olsen í stýrinum.

Stýrið hevur gjørt avtalu við Klaksvíkar Sjónleikarfelag um, hvussu Sjónleikarfelagið kann brúka húsið, so at virksemið á pallinum kann samskipast við biograf og onnur mentanarlig tilboð.

Bilar

Nr. 206 • hósdagur • 25. oktober 2001 • 75. árg.

Instrumentborðið er av nýggja slagnum við vísarunum í miðjuni

Hyundai Matrix – gjørdur í samstarvi við Pininfarina

Hyundai Matrix er gjørdur í samstarvi við italsku designarafyritøkun Pininfarina, sum er kend fyri at tekna bilar sum Ferrari og aðrar dýrar og sportligar luksusbilar. Talan er í hesum føri um ein rúmligan familjubil

BILAR
Magnus Gunnarsson

Hyundai Motor Company, ið varð stovnað í Korea í 1967, er í dag heimsins 7.størsta bilverksmiðja. Teir hava sett sær sum mál at koma á eitt 5.pláss tey næstu 10 árini. Hyundai komu til Danmarkar í 1992, og hava nú ein lutfallsliga stóran part av danska marknaðinum.

Italskt design

Hugskotið við Hyundai Matrix var at gera ein rúmligan og fleksiblan MVP, sum skuldi liva upp til tey krøv, sum nútíðin setur til ein nútímans bil. Talan er um ein 5 persónabil til barnafamiljur, ið hava brúk fyri góðum plássi, og er ein rúmligan frítíðarbil. Fyri at fáa bilin at verða annarleiðis enn aðrir MPV bilar, er hesin gjørdur í samstarvi Pininfarina designarafyritøkuna í Italiu.

Væl innrættaður

Matrix er væl innrættaður við nógvum smáum rúmum at leggja lutir frá sær á. Á stólarygginum á framsetrunum eru flúgvaraborð til tey ferðandi á baksetrinum. Baksetrini kunnu hvør sær stillast aftur og fram, so pláss eisini er til tey við longum beinum, ella um brúk er fyri meira plássi til viðførið. Bilurin er væl útgjørdur, og hevur t.d. sentrallás, el-rútar aftan og framman, el-síðuspegl og alt annað sum er at finna í nútímans bilum.

Lættur at parkera

Nógv er eisini gjørt burtur úr trygdini, og Matrix hevur 4 airbag, ABS bremsur við EBD og nakkapútur við øll setrini. Kabinan er sera trygg við trygdarbjálkum inni í hurðunum og í botnplátunum. Motorurin er ein 4 syl. 1.6 litur motor, við 16V og 103 hk. og er bæði orkusparandi og ljóðleysur. Koyrieginleikarnir eru í topp, og bilurin er lættur at seta frá sær, eisini har sum parkeringsviðurskiftini ikki eru so góð. Matrix hevur 3 ára ella 100.000 km mek. garanti og 6 ára rustgaranti.

Hyundai Matrix er gjørdur í samstarvi við italsku Pininfarina designarafyritøkuna. Her sýna Birgir og Frits Dam Jacobsen frá Norðbil bilin fram

Hyundai Matrix 1.6

Motorurin	4 syl. 1.6 litur 16V og 103 hk
0-100 km/t	12,7 sek.
Bensinnýtsla	12,5 km/l
Toppferð	170 km/t
Dekkstødd	185/65-14
Stødd	
Longd	403,7 cm
Hædd	168,5 cm
Prísur	kr. 152.750,-
Søluumboð:	Sp/f Norðbil Oyggjarvegur FO-100 Tórshavn Tlf.313707

Matrix er ein rúmligur 5 persónabilur, við annarleiðis smartum designi